Mentamálaráðið

Dagfesting: 16.04.2026
Mál nr.: 26/01807
Málsviðgjørt: EØ

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd (Barnaverndarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 46 frá 27. mars 2025, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 29. ... *Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um samsýning til fosturforeldur, gjald fyri uppihald og aðrar útreiðslur viðvíkjandi barninum. *Stk. 5.* Samsýningar og veitingar sambært hesi grein verða árliga javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.	**1.** § 29, stk. 4 og 5 verður strikað
	2. Aftaná § 29 verður sett: "**§ 29 a.** Samsýningin sbrt. § 29, stk. 2 er 137,02 kr. um samdøgrið fyri hvørt fosturbarn. **§ 29 b.** Eitt fast gjald um samdøgrið verður rindað til vistarhald og klæði til barnið sbrt. § 29, stk. 3. Tá upp til 2

	børn eru í somu fosturfamilju, er gjaldið fyri hvørt barnið ávikavist 224,76 kr. til børn undir 10 ár, og 236,59 kr. til børn 10 ár og eldri. Tá fleiri enn 2 børn eru í somu fosturfamilju, er gjaldið 209,55 kr. fyri hvørt barnið. **§ 29 c.** Eitt fast gjald verður um vikuna rindað til lummapening til barnið sbrt. § 29, stk. 3. Tá barnið er: 1) 3-6 ár er gjaldið 45,65 kr. 2) 7-10 ár er gjaldið 97,01 kr. 3) 11-13 ár er gjaldið 125,54 kr. 4) 14-15 ár er gjaldið 199,72 kr. 5) 16 ár og eldri er gjaldið 313,84 kr. **§ 29 d.** Útreiðslur til stovnan og útbúnað í sambandi við fosturuppihald kunnu rindast fosturforeldrum sbrt. § 29, stk. 3, tá ið barnið verður latið teimum, við upp til 9.476,89 kr. **§ 29 e.** Um barn verður sent til fosturforeldur í Danmark, eru donsku upphæddirnar fyri samsýning, lummapening, stovnan og útbúnað galdandi. **§ 29 f.** Afturat samsýningini í § 29 a verður lagt gjald til arbeiðsloysisskipanina, gjald til barsilsgrunnin, gjald til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og bundna eftirlønargjaldið sbrt. § 2 í løgtingslóg um eftirløn. **§ 29 g.** Um talan er um eitt barn við sera stórum avbjóðingum, kunnu fosturforeldrini samsýnast við upp til tríggjar ferðir samsýningini sbrt. § 29 a, umframt eina ferð føstu gjøldini í §§ 29 b og 29 c. *Stk. 2*. Um talan er um eitt barn við óvanliga stórum avbjóðingum, sum tí krevur heilt serliga røkt frá fosturforeldrunum, kunnu fosturforeldrini samsýnast við upp til sjey ferðir samsýningini sbrt. § 29 a, umframt eina ferð føstu gjøldini í §§ 29 b og 29 c.

	§ 29 h. Um talan er um eitt pinkubarn undir eitt ár, kunnu fosturforeldrini samsýnast við upp til sjey ferðir samsýningini sbrt. § 29 a, umframt eina ferð føstu gjøldini í §§ 29 b og 29 c. **§ 29 i.** Samsýning sbrt. §§ 29 g og 29 h kann bert veitast í 3 mánaðir í senn. Eftir hetta tíðarskeið skal metast, um tiltakið virkar eftir ætlan, og um ráðiligt er at halda áfram við tiltakinum. **§ 29 j.** Samsýningar og veitingar sbrt. §§ 29 a, 29 b, 29 c og 29 d verða árliga javnaðar sbrt. løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.”